# Trygdin í SEV er ein tikkandi bumba

## Spurningar til Leiv Hansen, stýrisformann í SEV)

HANS TAUSEN OLSEN
Umboðsnevndarlimur



Oljudálkingin í Vági fyri nøkrum mánaðum síðan - ella beint fyri jól í 2006, mátti koma fyrr ella seinni, tí SEV hevur einki skipað innaneftirlit (sikkerhedskvalitetsstyringssystem). Leivur Hansen og hansara aliansa koyrdu meirilutan av SEV-stýrinum frá í februar 2006, tí hesir vildu innføra skipaði viðurskifti í SEV. Ein av ætlanunum var at skipa eitt innaneftirlit (sikkerhedskvalitetsstyringssystem), sum eisini var eftir tilmæli frá Dansk Energi og sum er kravt í Stærkstrømsbekendtgørel sen. Stærkstrømsbekendtgørelse n er eisini galdandi fyri Føroyar.

Tá ið oljan kom út í tangagarðin, var tað tí, at tangin lak. Tangagarðurin eigur at verða ein eyka trygd fyri, at hann tekur ímóti oljuni, sum møguliga skuldi likið úr oljutanganum. Myndugleikarnir krevja hesa eyka trygd, ein tangagarð, soleiðis, at ein hending sum henda, ikki skal kunna henda. – Var hetta hent uttanlands, so hevði hetta verið at rokna sum ein gøla, og neyvar kanningar frá pressuni og myndugleikunum høvdu kunna staðfest og revsa teir seku!

Bert 17 dagar frammanundan hendiningi í Vági, hevði Leivur Hansen, stýrisformaður í SEV, greitt umboðsnevndini soleiðis frá: "Á Vágsverkinum hevur verið arbeitt við at umvæla tann størra tungoljutangan uppá 3000 kubikk. Umvælingin er liðug, og verður olja aftur latin í tangan tann 30. november 2006. Allur toppurin og smærri hol á síðuni eru umvæld, talan er um teringar, men sum heild er tangin í góðum standi...."

Beint eftir hendingina í Vági, segði Klæming Weihe, SEV-stjóri, alment, at hann var ovfarin av hendingini. Soleiðis fekk hann tosað seg burturúr hesum kleyvarskapi sum so mongum øðrum hjá SEV, tí eingin - ella næstan eingin setir seg inn í trupulleikarnar í SEV. –Leivur Hansen hevur so enn einaferð prógvað, at hann hvørki hevur evni ella vilja at seta seg inn í trupulleikarnar í SEV. –Jú, Leivur Hansen er ein mikið skemtingarsamur maður sum Jógvan Ósá, fyrrv. sýslumaður á Sandi, sigur í Norðlýsinum. Leivur Hansen skuldi kanska bert hildið seg til tann leiklutin!

Leivur Hansen, stýrisformaður í SEV, eins og SEV-stjórin Klæmint Weihe, vóru frákoyrdir í umleið 1 mánað í januar/februar 2006. Teir vóru fráoyrdir, tí teir mótarbeiddu einum demokartiskt valdum meiriluta í SEV-stýrinum, men sjálvt hetta skilti Leivur ikki – men bleiv við at geva seg út fyri at vera formann! Hann var heldur ikki í umboðsnevndini tá, og mær vitandi er hann heldur ikki í umboðsnevndini enn. Men fyri Leiv Hansen er umboðsnevndin fyri onki at rokna, og hansar orð um umboðsnevndina eru: "Umboðsnevndin er steindeyð"!

Leivur vil, at man skal stíla hægri, sjálvt hægri enn umboðsnevndin, sum er hægsta vald og myndugleikin – fyri at koma sær hægri á tindarnar, sjálvt um hann ikki hevur minsta innlit í SEV, tí SEV-stjórin einsamallur stýrir Leivi og øllum SEV-stýrinum. Og Leivur er heldur ikki ein gang limur í umboðsnevndini!

**Hví so stór náttúruvanlukka?**

Sannleikin um hendingina í Vági er, at fyri tað fyrsta varð tangin ikki umvældur sambært teimum ásetingum, sum kravdar verða, men tað sum er nógv verri, er, at tá ið so oljan lak út í tangagarðin í Vági, stóð ventilurin (frárenslið) í tangagarðinum opið. Tað merkir, at oljan hevði fría leið at renna oman í Vágsfjørð.

Alt hetta prógvar, at trygdin í SEV als ikki er í lagi. Hetta hevði als ikki komið fyri, um innaneftirlitið varð skipað eftir forskrifunum: At ein av SEV óheftur persónur ella stovnur hevði verið og kannað tangan við rønthgenmyndum og soleiðis veitt trygd fyri góðskuni á tanganum.

Tí spyrji eg:

1. Hvør stóð fyri kanningini av oljutanganum í Vági og veitti trygd fyri, at hann var í lagi, soleiðis sum stýrisformaðurin greiddi umboðsnevndini frá?

2. Hvør hevði ábyrdina av bunkringini ?

3. Hvør hevði ábyrdina av, at tangagarðurin kundi taka ímóti oljuni, um óhapp hendi?

4. Hvør hevði ábyrdina av, at ventilurin í tangagarðinum stóð opin, meðan olja varð latin í tangan?

5. Hvør hevði ábyrdina av, at so stórar nøgdir kundu renna út í Vágsfjørð undir eini bunkring?

6. Hvør tekur ábyrgdina av at gjalda fyri hendan kleyvarskap, sum helst kostar 10 millónir krónur? Ella hvat er kostnaður av uppruddingini komið uppá nú?

7. Hvussu nógv hevur hendinging skatt náttúruna. Er nøkur skráseting, sum vísir, hvussu nógvur fuglur doyði?

Sum umboðsnevnarlimur vil eg fegin fáa skrivligt svar uppá hesar spurningar, tí eg haldi, at hetta er so álvarsligt mál fyri alt Føroya fólk. Eg veit eisini við vissu, at nevnda hending í Vági saman við so mongum øðrum hevur ikki uppbygt álitið á SEV! Hetta er so ein almenn roynd at fáa støðuna lýsta!

# Miðbýurin í Klaksvík

ARCHIBALD BLACK





Gløgt er gestsins eyga. Eg hevði vitjan av donskum listarmanni nú um dagarnar. Eftir at hava heilsað hvør upp á annan er eitt tað fyrsta hann sigur: "Jeg ser, at I er ved at fylde godt op inde i jeres smukke vig, den slags gjorde vi i Danmark tilbage i 60-70´erne. Hjemme hvor jeg bor er man ved at grave det hele op igen for at sætte det i oprindelig stand".

Fyrstu ferð eg hoyrdi um ætlaða keypssentrið í miðbýnum, var eg í iva, helt tó, at hetta ljóðaði spennandi. Miðbý hava vit jú ongan.

Teir grannar vit annars samanbera okkum við hava fyri 15- 20 árum síðani lagt síni sentur út um býirnar.

Nú skal sigast, at eg sum so einki havi ímóti einum sentri, men er tað rætt at leggja tað mitt í hjartað í býnum? Eg haldi ikki!

Alt gott um ein risastóran matvøruhandil við slaktara, krásadeild og innkeypsvognum í amerikanskara stødd, hetta er tó eitt stað , eg fari til millum kl. 8.00 og 19.00 og ikki, tá ið eg fari í býin.

Fyri at eitt sentur skal yvirliva, má eitt stórt parkeringsøki til, og kunnu vit skjótt semjast um, at slík ikki eru serliga hugnalig.

Í útlandi havi eg gingið tvørtur um stórt parkeringsøki á náttartíð, har roynt varð at bøta um støðuna við smáum runnum og ljóssteyrum, men gjørdi hetta bert støðuna verri. Fyri hvørjar 5-10 metrar, mátti eg skeita aftur um bak, tí eg kendi meg ótryggan.

Um nøkur fá ár kunnu fólk á Skálafjørðinum koyra í undirsjóartunnli til Havnar, tá verður Stóratjørn eisini veruleiki. Kunnu vit kappast ímóti hesum? Eg haldi ikki.

Hvat kunnu vit so kappast við? Jú, vit kunnu bjóða ein miðbý, ið aðrir ikki hava.

Eg vil her taka táttin upp, ið Gunnar Nolsøe segði í útvarpssending: "Vit skulu hava eina brúgv tvørtur um vágna, ið bindur eystur og vestur saman".

Hetta vildi eg tó broytt til eina bygging, sum skapar eina stóra rundgongu um handilslívið í miðbýnum. Í dag er støðan tann, at vit fara norðureftir og heimaftur, fyri síðani at fara úteftir. Keðiligt!

Ímynda vit okkum byrgingina lága við flag á síðunum og skráar av gróti, tættar ljóssteyrar, sum endurspeglast í sjónum á kvøldartíð, so fáa vit eina vakra sjón.

Vit kunnu eisini ímynda okkum eina oyggj mitt á byrgingini um 500-1000 fermetrar til støddar.

(tilfar er nóg mikið av). Gera vit síðani eina føroyska "pavillion" við flagtaki, kunnu jú ymsar framførslur havast har. Romantikari hugsar onkur, gaman í, hví ikki?

Innanfyri fáa vit ein stóran" dunnuhyl". Hugsið tykkum nú ein vakran summardag. Árabátar, gummibátar, kajakkir og træbrúgvar- ein rættilig marina.

Framvið fjøruni kundu vit havt ein strandveg, eina gongugøtu. Eftir hesari kundu húsini havt íbúðir í erva og handlar í neðra. Vit høvdu tá fingið eina samanrenning av Bryggen og Nýhavnini, bert enn hugnaligari, tí vit hava útsýnið, byrgingina og "dunnuhylin".

Fornminni, framtíðin og býráðið. Í hesum sambandi má og skal eg nevna bakkahjallarnar og neystið hjá Nólsoyar Pálli. Hetta økið kundi verið ein grøn perla, men liggur nú sum ein býarskomm.

Fleiri milliónir til eina rampu til framtíðarætlanir í Ánunum, eingin trupulleiki!

Nakrar fáar hundrað túsund til okkara samleika og fortíð, stórur trupulleiki!

Fyri ikki at gerast ov langrøkjutur, fari eg at enda her, onnur kunnu taka táttin uppaftur.

Mín meining er, at útfyllingin er ein syrgilig gøla!

Sagt varð at byrja við, at hetta var fyribils, og at útfyllingin skuldi takast burtur aftur.

Átti friðingarmyndugleikin ikki at verið eftirspurdur ella gjørt vart við seg?. Var nøkur býarsamtykt?

Tað er eingin sum helst harmoniur í hasari útfyllingini sæð frá einum estetiskum horni. Eg haldi, vit eru alt ov skjót at apa okkum eftir tí útlendska. Hví ikki síggja tað serstaka hjá okkum sjálvum.

Fyri eftirtíðina skylda politikararnir okkara eftirkomarum at taka røttu avgerðina. Tað er ein stór ábyrgd. Her kann ikki hugsast um løtuvinning.

Teir eiga skommina ella æruna.